# Dagrøktarar til Leirvíkar kommunu

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir dagrøktarum og møguligari hjálp, at byrja tann 1. mai 2006.

**Vit ynskja at tú**
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri.
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum.
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni.
- Ert tolin og vísir umsorgan.
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Í dagrøktarskipanini starvast 8 dagrøktarar og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 40.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktarnir ísenn við børnunum í fimleikarhøllini.
Arbeiðstíðin er ímillum 7.30-17.15. Lønin er sambært sáttmála við FA.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøktarleiðara.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. apríl 2006.

Vinarliga send umsókn tygara til

**Leirvíkar Kommunu**
**Dagrøktarskipanin**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**



# Sethús í Brekkuni 4, Tórshavn til sølu

Ognin matr.nr. 1002ap, í Brekkuni, Tórshavn er til sølu um hóskandi boð fæst. Grundøkið er 398 kvm. Húsini eru bygd í 1968, og liggja væl fyri við góðum útsýni og í sera friðarligum umhvørvi.

**Í húsunum er:**
**Loft:** Gongd, lítið goymslurúm og tvey kømur.
**Miðhædd:** 115 kvm. Durur/gongd, køkur, stova, hjúnarúm, tvey kømur og baðirúm.
**Kjallari:** Íbúð á uml. 80 kvm. við køki, stovu, hjúnarúm, lítið kamar inn av stovuni, gongd/durur og baðirúm. Harafturat er vaskikjallari við oljufýr inni. Inn av durinum er gjørt lítið amboðsrúm.
Bilskúrur (carport) og hjallur. Inngongd til hjallin er inn frá durinum í miðhæddini.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · 100 Tórshavn
Tlf. 311260, fax. 311261
e-mail: ge@lawfirm. fo

Tormóður Djurhuus, adv., Jógvan Páll Lassen, adv., Petur Even Djurhuus, adv., Jógvan E. Ellefsen, adv., Anna Dam, adv., Ingi Højgaard, adv.

# Skrivstovufólk til Gøtu Kommunu

Søkt verður eftir skrivstovufólk til kommunuskrivstovuna í Gøtu, at byrja skjótast tilber.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
- ábyrgd av roknskapinum hjá kommununi
- at føra dagliga bókhaldið
- stýring av debitorum og kreditorum
- journalisering
- fólkayvirlit
- aðrar fyrifallandi uppgávur

**Útbúgving v.m.:**
- viðkomandi útbúgving
- góðan kunnleika til teldutøkni

**Persónligir eginleikar:**
Vit vænta at tann, ið sett/ur verður,
- er ágrýtin og kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur lætt at samskifta við onnur
- hevur góð samstarvsevni

**Setanarviðurskifti:**
- talan er um fulltíðarstarv
- løn og setanarviðruskifti annars eru sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Tann, ið sett/ur verður, má kunna tola, at møguligar broytingar í bygnaðinum hjá kommununi verða gjøgnumførdar, eisini um hesar hava við sær eitt broytt starvsøkið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 44 10 12, ella borgarstjóran á tlf. 21 29 12.

Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum, skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 4. apríl 2006, kl. 12.00.

**Gøtu Kommuna**

Tlf. 44 10 12 · Fax 44 17 74 · www.gota.fo
Við Gjónna 2 · Postboks 40 · FO-510 Gøta

*Hjá kommununi starvast í løtuni 3 skrivstovufólk fulla tíð. Harafturat eru 2 fólk innan teknisku umsitingina knýtt at kommunuskrivstovuni. Bókhaldið hjá kommununi fevnir um allar stovnar undir kommununi, herundir eisini lønarútgjaldingar v.m.*



MØTIRØÐIN

## »Liva vit í síðstu døgum«

í

## »FILADELFIA« Í GØTU

frá mikukvøldinum 29. mars kl. 20.00 til sunnukvøldið 2. apríl kl. 18.00

**Jógvan og Z. Zachariassen tala um evni sum:**
- Hvørja ávirkan hevur afturkoma Harrans á mítt gerandislív?
- Er dýrd Harrans vikin frá Ísrael?
- Upptornaðu beinini í Ez. 37 livna upp aftur
- Bardagin í Ísraelslandi við Gog og fylgisneytar hansara í Ez. 38-39
- Dýrd Ísraels og vón samkomunnar

**Ymiskar sangkreftir**
Sunnukvøldið syngur gentukórið úr »Ebenezer«

**Øll eru hjartaliga vælkomin !**

# Frá Føroya Lærarafelag

***Stevna í Finnlandi fyri eftirløntar lærarar***

Í døgunum 10. - 14. juni 2006
hittast eftirløntir lærarar

í Turku/Åbo

Stevnugjald: - einkultkamar: 4.350 kr.
- dupultkamar: 3.525 kr.

**Freistin at tekna seg er 7. apríl.**

Avmarkað pláss er til skeiðið.
Føroya Lærarafelag veitir fíggjarligan stuðul.

Limir kunnu venda sær til skrivstovu felagsins og biðja um skránna fyri stevnuna, og har fer tilmeldingin eisini fram.

# Vaskifólk

Hervið verður søkt eftir einum vaskifólki til Vestmanna Skúla at byrja 1. mai 2006.

Arbeiðið er lønt sambært sáttmála ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Vestmanna Kommunu, tlf. 470110.

Skrivlig umsókn skal vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinsta lagi 11. apríl 2006.

**Vestmanna kommuna**